# Ársfrágreiðing 2023

Etiska ráðið

Etiska ráðið

Varðagøta 9

100 Tórshavn

Føroyar

Tlf: + 298 219484

T-postur: er@er.fo

www.etiskaradid.fo

Ársfrágreiðingin er teldutøk á heimasíðuni.

Januar 2024

# Innihald

Formæli ... 4

Um Etiska ráðið ... 5

- Uppgávan hjá Etiska ráðnum ... 5
- Setan av ráði og hvør situr í ráðnum ... 5
- Ráðslimir ... 6
- Fyrisiting ... 8
  - Heilsumálaráðið ... 8
  - Formaður ... 8
  - Reglugerðin ... 8
  - Skrivstovan ... 8

Etisk evni ... 9

- Fosturtøka ... 9
- Screening fyri arvaligar sjúkur ... 9
- Raðfestingar innan heilsuverki ... 10
- Vitlíki ... 10
- Innkomin mál ... 10
  - Hoyringamál ... 10
  - Mál frá borgarum o.ø. ... 11

Virksemi ... 12

- Fakligt samstarv og menning ... 12
  - Ulrike Steuerwald framløga ... 12
  - Avvarandi framløga ... 12
  - Dátueftirlitið ... 12
  - Granskingaretikkur ... 12
  - Rokningarvergongd og trygdarpakkin ... 12
  - Onnur etisk ráð og nevndir ... 13
- Útgávur og miðlan ... 14

Ársfrágreiðing 2022 .......... 14
Heimasíðan .......... 14
Facebook .......... 14
Etiska ráðið í miðlum .......... 14
Fundarvirksemi .......... 14
Luttøka uttanhýsis .......... 16
Fyrisitingin .......... 16
Skrivstovuhøli .......... 16
Fíggjarstøða .......... 16
Arbeiðsorka .......... 16
Ætlanir 2023 .......... 17
Samanumtøka .......... 17

# Formæli

Ársfrágreiðingin lýsir virksemið hjá Etiska ráðnum farna árið, hvørji evnir, ráðið hevur arbeitt við, og hvussu ráðið hevur arbeitt fyri at røkka sínum endamáli.

2023 hevur verið eitt hendingaríkt ár hjá Etiska ráðnum. Tó at ráðið ikki hevur verið eins virkið alment, sum ráðið kundi hugsað sær, so er nógv hent handan leikpallin.

1. mars 2023 fekk Etiska ráðið nýggjan fakligan skrivara, Regin Berg, ið er Master of Arts í politikki og altjóða politikki, umframt at hann hevur Master í lóg. Regin er fallin væl til í virkseminum hjá Etiska ráðnum, og umframt ráðsfundirnar, so hittast formaðurin og fakligi skrivarin fast einaferð um vikuna. Nakað av tíð er farin hjá Regini til at seta seg inn í ymsu skipanirnar og fyrisitingarligu uppgávurnar, ið eru knýttar at Etiska ráðnum.

19. apríl skipaði Etiska ráðið fyri ráðstevnu í Skúlanum við Løgmannabreyt um fosturtøku. Ógvuliga nógv fólk møttu til ráðstevnuna, eins og ráðstevnan varð tikin upp. Endamálið við ráðstevnuni var at stuðla uppundir, at tó at kjakið um fosturtøku er merkt av sterkum kenslum og ósemju, so ber væl til, at kjakast siðiliga og við grundaðum argumentum um evnið. Hetta megnaðu luttakararnir í tiltakinum eisini væl at vísa. Ætlanin er at nýta tilfarið frá ráðstevnuni til at framleiða undirvísingartilfar um fosturtøku.

Frá 1. apríl varð leigumálið hjá Etiska ráðnum uppsagt í Smæruni. Tað at finna nýggj skrivstovuhøli – og eftirfylgjandi at flyta – fylti rættiliga nógv í 2023. Ein lýsing eftir høli varð løgd út á Keypsportalin, og við góðum stuðli frá Landsverki, endaði hendan gongdin við, at Etiska ráðið fekk serstakliga góð skrivstovuhøli í KFUK bygninginum í Varðagøtu 9. Umframt at sjálvi hølini eru avbera góð, so geva hølini eisini møguleika fyri, at Etiska ráðið kann lána stóru hølini hjá KFUK til tiltøk, eins og Etiska ráðið hevur atgongd til atkomuvinarlig fundarhøli.

Leitanin eftir hølum hevur havt við sær, at Etiska ráðið valdi ikki at skipa fyri nøkrum øðrum tiltaki í 2023. Hetta eisini fyri at tryggja okkum, at ráðið ikki brúkti fleiri pengar enn tað, sum er til taks. Ráðið hevur tó brúkt nógva tíð at fyrireika evni, sum ætlanin er at varpa ljós á komandi ár. Hesi eru raðfestingar í heilsuverkinum, screening fyri berarar av arvaligum serføroyskum sjúkum, og leikluturin vitlíki hevur (og fer at hava) í almanna- og heilsuverkinum. Fyrireikingin er komin hampiliga langt tá um ræður tvey tey fyrstu evnini, og ætlanin er at skipa fyri tiltøkum komandi ár.

Samanborið við 2022 hevur Etiska ráðið harumframt fingið tvífalt so nógv mál til hoyring/ummælis í 2023, og hevur antin svarað øllum skrivliga ella verið á fundi um øll málini. Hendan gongdin er góð, men tað eru eisini fleiri mál, ið Etiska ráðið átti at fingið sendandi afturat – eins og bæði Løgtingið og kommunurnar kundu gagnnýtt Etiska ráðið væl meira enn tey gera. Økt virksemi krevur tó, at játtanin til Etiska ráðið veksur. Við verandi játtan verður tað ein stór avbjóðing hjá Etiska ráðnum, at skipa fyri teimum tiltøkunum, sum ætlanin er at hava í 2024, og samstundis hava neyðuga fyrireikandi arbeiðið. Longu til verandi virksemið er starvsbrøkurin hjá fakliga skrivaranum ov lágur, so tí vónar Etiska ráðið, at játtanin til ráðið veksur komandi ár.

Bergur Debes Joensen, formaður

# Um Etiska ráðið

## Uppgávan hjá Etiska ráðnum

Etiska ráðið er sett at virka samsvarandi løgtingslóg nr. 70 frá 29. mai 2017 um Etiskt ráð.

Etiska ráðið skal fremja og styrkja kjak og vitan um etiskar spurningar, ið knýta seg til heilsufakligt virksemi á heilsuøkinum, almannaøkinum og kommunala økinum. Hetta verður m.a. gjørt við at skipa fyri ráðstevnum, evnisdøgum og kjakfundum fyri at varpa ljós á aktuellar etiskar spurningar.

Etiska ráðið skal ráðgeva løgtingi, landsstýrinum og almennum myndugleikum í etiskum spurningum. Etiska ráðið hevur skyldu til at fylgja menningini á tí bio- og íleguteknisku økinum og hevur til uppgávu at ráðgeva í etiskum spurningum viðvíkjandi gransking í og nýtslu av bio- og ílegutøkni.

Ráðið virkar óheft og velur sjálvt tey evnir og teir spurningar, tað tekur til viðgerðar. Tað er ikki krav, at Ráðið er samt í sínum niðurstøðum um ávís etisk evnir. Heldur er umráðandi at lýsa ávísu evnini úr ymiskum sjónarhornum, og búgva almenningin og tey, sum skulu taka støðu til tey ymsu evnini, til víðari kjak og støðutakan.

Ráðið skal lata úr hondum minst eina frágreiðing um árið.

## Setan av ráði og hvør situr í ráðnum

Í lóggávuni er ásett, at tað er landsstýrisfólkið í heilsu- og innlendismálum, sum setur limirnar í Etiska ráðnum. Etiska ráðið hevur níggju limir, ið verða settir fyri fýra ár í senn. Tilnevningin verður gjørd eftir ávísum reglum, soleiðis at landsstýrisfólkið í heilsu- og innlendismálum tilnevnir formannin í ráðnum, umframt ein lim. Harumframt tilnevnir landsstýrisfólkið í heilsu- og innlendismálum tríggjar limir eftir tilmæli frá landsstýrisfólkunum í ávikavist almannamálum, vinnumálum og mentamálum, ein lim eftir tilmæli frá Kommunufelagnum og tríggjar limir eftir tilmæli frá politisku flokkunum, ið hava umboð á løgtingi.

Tey, ið verða tilnevnd í ráðið, skulu hava innlit í etisk, mentanarlig, samfelagslig og faklig viðurskifti, ið hava týdning fyri virksemið hjá ráðnum. Limir í ráðnum kunnu ikki sita á løgtingi ella í kommunustýri.

Limirnir verða sitandi í ráðnum, til nýggir limir eru tilnevndir. Tá ið ráðið verður sett av nýggjum, verður miðað eftir, at í minsta lagi tríggir limir frá undanfarna valskeiði verða sitandi eitt valskeið afturat. Limir kunnu verða settir av nýggjum eina ferð.

Landsstýrisfólkið í heilsu- og innlendismálum skal tryggja, at ráðið verður samansett við fólki við fjølbroyttum útbúgvingum og royndum, og at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðað.

## Ráðslimir



**Bergur Debes Joensen**
Sóknarprestur í Suðurstreymoyar prestagjaldi.

Tilnevndur formaður í 2022 av landsstýrismanninum í heilsumálum.



**Katrin Kallsberg**
Serlækni í gynækologi/obstetrik. Starvast sum lækni í kvinnusjúkum á Landssjúkrahúsinum.

Tilnevnd í 2022 av landsstýrismanninum í heilsumálum.



**Jógvan D. Hansen**
Cand.phil. Starvast sum lærari í heimspeki.

Tilnevndur í 2018 (seinna seta frá 2022) eftir tilmæli frá politisku flokkunum á løgtingi.



**Arni Zachariassen**
Cand.theol. Rúsviðgeri á Bláakrossheiminum.

Tilnevndur í 2022 eftir tilmæli frá politisku flokkunum á løgtingi.



**Súsanna Mortensen**
Námslektari í sjúkrarøktarfrøði. Starvast á Fróðskaparsetrinum.

Tilnevnd í 2022 eftir tilmæli frá politisku flokkunum á løgtingi.



**Jóngerð Guttesen**
Master of Public Governance. Starvast sum leiðari í Roðanum.

Tilnevnd í 2022 eftir tilmæli frá Kommunufelagnum.



**Leif Olsen**
Sosialráðgevi. Starvast sum ráðgevi í Almannaverkinum.

Tilnevndur í 2018 eftir tilmæli frá landsstýriskvinnuni í almannamálum.



**Noomi Gregersen**
Cand.scient í mýlalívfrøði. Verkætlanarleiðari í Fargen.

Tilnevnd í 2022 eftir tilmæli frá landsstýrismanninum í vinnumálum.



**Marjun Asbjarnardóttir Lómaklett**

Sóknarprestur í Norðoya vestara prestagjaldi og integratiónsprestur.

Tilnevnd í 2022 eftir tilmæli frá landsstýriskvinnuni í mentamálum.

## Fyrisiting

### Heilsumálaráðið

Heilsumálaráðið umsitur lógina, sum Etiska ráðið virkar eftir. Heilsumálaráðið er ovasti fyrisitingarligi myndugleiki hjá Etiska ráðnum, og veitir ráðnum løgfrøðiliga og aðra ráðgeving, tá ið tørvur er á tí. Heilsumálaráðið umsitur eisini bókhald og roknskap fyri Etiska ráðið.

### Formaður

Formaður fyri Etiska ráðið er Bergur Debes Joensen, sum tók við sessinum 1. oktober 2022. Formaðurin leiðir fundirnar í ráðnum, og tað er hann, sum úttalar seg alment vegna ráðið. Formaðurin fær samsýning sambært galdandi reglum.

### Reglugerðin

Etiska ráðið virkar eftir reglugerð, har ásett er, hvussu ráðið starvast samsvarandi § 6, stk. 7 í løgtingslóg um Etiskt ráð.

### Skrivstovan

Á skrivstovuni hjá Etiska ráðnum starvast fakligur skrivari hálva tíð. Uppgávan hjá skrivstovuni er at tæna Etiska ráðnum at røkja sína uppgávu, sum er at fremja og styrkja kjak og vitan um etiskar spurningar, ið knýta seg til heilsufakligt virksemi á heilsuøkinum, almannaøkinum og kommunala økinum, og at gera almennar myndugleikar og borgarar betur førar fyri at taka støðu í etiskum spurningum.



Fakligur skrivari er Regin Berg, Master of Arts í politikki og altjóða politikki og Master í lóg, settur í 2023 eftir tilmæli frá Etiska ráðnum.

Fakligi skrivarin leggur til rættis ráðsfundirnar saman við formanninum, og hevur um hendi dagliga virksemið á skrivstovuni.

Uppgávan er harumframt m.a. at savna inn tilfar og greina tilfarið fyri ráðið.

Etiska ráðið leigar høli til skrivstovu, fundir og annað virksemi í Varðagøtu 9, FO-100 Tórshavn.

# Etisk evni

Í 2023 hevur Etiska ráðið av sínum eintingum serliga arbeitt við fýra evnum, sum eru:

- Fosturtøka
- Screening fyri arvaligar sjúkur
- Raðfestingar innan heilsuverkið
- Vitlíki

Harafturat hevur ráðið arbeitt við málum, sum tað hevur fingið til hoyringar frá myndugleikunum í sambandi við lógararbeiði, og málum, sum fólk, feløg, miðlar og onnur hava heitt á ráðið um at taka upp.

## Fosturtøka

Fáir spurningar eru so spjaðandi sum spurningurin um fosturtøku. Spjaðingin stavar í stóran mun frá, at alt eftir hvørt ein er ímóti ella fyri rættinum at fremja fosturtøku, so er útgangsstøðið fyri kjakið ymiskt. Tey, sum eru ímóti fosturtøku, taka útgangsstøði í fostrinum, meðan tey, sum eru fyri fosturtøku, taka útgangsstøði í kvinnuni. Í Føroyum benda meiningarkanningar á, at fólk eru rættiliga tvíbýtt, tá um ræður spurningin um fosturtøku – beint undir helvtin vil hava fría fosturtøku, og eitt líknandi tal ynskir, at fosturtøka bert skal loyvast í ávísum førum.

Hetta er ikki eitt serføroyskt fyribrigdi. Nógvastaðni er hendan spjaðingin blivin so ógvuslig, at tað er ringt hjá fólki at síggja hvønn annan í eyguni og kjakast siðiliga um spurningin. Støðan er í so máta frægari í Føroyum, tó at serliga kjakið á sosialu miðlunum ofta er hart og eyðmerkt av skotgrøvum.

Fyri at stuðla undir fakligt kjak, har fólk lurta og grundgeva, heldur enn bara at tosa ímóti hvør øðrum, skipaði Etiska ráðið fyri einum tiltaki um fosturtøku. Ráðslimirnir høvdu fleiri fundir saman við fakliga skrivaranum fyri at skipa innihaldið og fokus í tiltakinum. Fokus á tiltakinum var hvørji argumentini eru, og bæði fakfólk, limir í ráðnum, og fólk umboðandi báðar síðurnar í kjakinum luttóku í kjakinum. Tiltakið var væl eydnað, og tó at fólk vóru ósamd, so var tiltakið eitt dømi um, at tað ber væl til at lurta og kjakast um eitt evni, tó at tað er merkt av kenslum, og útgangsstøðið fyri argumentini er ymiskt.

Tiltakið var tikið upp og liggur á heimasíðuni hjá Etiska ráðnum. Ætlanin er at framleiða fakliga grundað undirvísingartilfar á miðnámsskúlastøði um fosturtøku – eitt nú við støði í upptøkunum.

## Screening fyri arvaligar sjúkur

Etiska ráðið fekk eina áheitan um at taka evni “screening fyri arvaligar sjúkur” upp – við denti á meira álvarsomu serføroysku sjúkurnar. Talan er um screening av fólki, fyri at finna fram til berarar av ílegunum. Um sama mundi kom eisini fram at hetta er eitt mál, ið politiska skipanin ætlar at taka upp. Ætlanin hjá Etiska ráðnum er, at almannakunngera eina frágreiðing um evnið í 2024.

Etiska ráðið hevur framleitt nakað av innanhýsis tilfari, ið ætlanin er at arbeiða víðari við, eins og ráðið hevur havt vitjan av umboðum fyri Arvasjúkan, og Ulrike Steuerwald hevur somuleiðis verið á einum ráðsfundi at kunna ráðið um evnið.

## Raðfestingar innan heilsuverki

Undanfarna ráð arbeiddi við spurninginum um raðfestingar innan heilsuverkið. Núverandi ráð hevur valt at halda á við hesum arbeiðinum, og ætlanin er at skipa fyri einum tiltaki um evnið í august/september í 2024. Ráðið hevur havt nakrar fundir um evnið í ár.

Evnið er stórt og krevur nógv ymisk etisk atlit. Tískil er nakað av tíð farin til at seta seg inn í, hvat undanfarna ráð arbeiddi við, at lesa tilfar og yvirhøvur at nágreina júst hvør arbeiðssetningurin er. Eitt aðalmál er at framleiða nakrar etiskar leiðreglur, sum kunnu nýtast, tá ein raðfestir innan heilsuverkið. Sum er, kann ein ofta hava eina fatan av, at kjakið innan raðfestingar í heilsuverkinum er meira merkt av, hvørjir bólkar hava orkuna at bera sína søk fram, og at raðfestingarnar kunnu verða merktar av, hvør er sloppin framat miðlunum ella politisku skipanini, heldur enn almennum, gjøgnumskygnum og etiskt grundaðum leiðreglum.

## Vitlíki

Etiska ráðið hevur samtykt, at triðja málið ráðið arbeiðir við í 2024 er vitlíki. Fokus verður á vitlíki innan almanna- og heilsuverkið, og tær etisku tvístøðurnar, sum kunnu koma av, at ein í alt størri mun gagnnýtir vitlíki – eins væl og tær tvístøðurnar, sum kunnu koma, um ein velur at lata vera við at gagnnýta vitlíki innan ávís øki.

Vitlíki mennist í løtuni við rúkandi fer, og tað kann bæði hava sera góðar og sera ringar avleiðingar við sær. Somuleiðis kunnu bæði fyrimunir og vansar vera við, at vitlíki so við og við yvirtekur fleiri uppgávur innan almanna- og heilsuøkið, ið fólk annars hava tikið sær av.

Etiska ráðið er komið inn á evnið á nøkrum fundum, eins og nakað av fyrireikandi innanhýsis tilfari er framleitt. Hetta er tó tað av teimum fýra evnunum, ið ráðið er komið stytst við í 2023, og tískil verður tað vónandi í seinnu helvt av 2024, at nakað alment kemur fram um vitlíki.

## Innkomin mál

### Hoyringamál

Etiska ráðið fekk í 2023 10 lógaruppskot og kunngerðir til hoyringar, ið er dupult so nógv sum í 2022, og svaraði øllum skrivliga. Hoyringarsvarini eru at finna á heimasíðuni hjá ráðnum. Annað tilfar í sambandi við málini er at finna á heimasíðunum hjá Føroya Løgtingi, Løgmansskrivstovuni og avvarðandi ráðum. Harumframt luttók Etiska ráðið á trimum fundum í sambandi við ætlaðar broytingar

*Uppskot til løgtingslóg um Mínboks*

Hoyringarsvar, feb. 2, 2023

*Kunngerðir um heilsuvísindaliga gransking*

Hoyringarsvar, 30. mai 2023 – svarini til tvær kunngerðir vórðu løgd saman í eitt skriv.

*Kunngerð um krabbameinsskrá og um at fráboða*

Hoyringarsvar, jun. 21, 2023

*Ílegulógin II*

Hoyringarsvar 3. august 2023.

*Uppskot til broyting í revsilógini*

Hoyringarsvar 30. juni og luttóku á fundi við løgmálaráðið 29. juni 2023.

*Kunngerð um endurgjald fyri mista inntøku í sambandi við ansing av barni*

Hoyringarsvar, 10. august 2023.

*Uppskot til broyting í revsilógini (kynslig avnoyðsla og lokking)*

Hoyringarsvar, 19. september 2023.

*Ílegulógin II – nýggj hoyring vegna broytingar*

Hoyringarsvar, 28. november 2023.

*Bekendtgørelse om ændring af sprogkrav for sygeplejersker*

Hoyringarsvar, 30. oktober 2023.

### *Fundur um møguligar broytingar í fosturtøkulógini*

21. september vóru umboð fyri Etiska ráðið á fundi í Løgmálaráðnum at umrøða møguliga broytingar í fosturtøkulógini. Í og við at Etiska ráðið ikki hevur eina samlaða meining um spurningin um fosturtøku, so var ein limur við umboðandi meira progressivu sjónarmiðini, og ein limur umboðandi meira konservativu sjónarmiðini, umframt fakligi skrivarin.

### *Fundur um nýggja journalskipan í heilsuverkinum*

5. oktober vóru ein ráðslimur og fakligi skrivarin á fundi um nýggja journalskipan innan heilsuverkið. Sjúklingaráðið og ráðgevarafyritøkan Silverbullet vóru eisini við, umframt umboð fyri heilsuverkið. Etiska ráðið hevði eina blanding av meira praktiskum og meira prinsipiellum etiskum viðmerkingum við fokus á, hvussu ein fær eina eina virkisføra skipan, og hvussu ein finnur javnvágina millum rættin til innlit í egin viðurskifti og vernd móti innliti, sum ein ikki er ílatin at skilja avleiðingarnar av.

## Mál frá borgarum o.ø.

### *Screening fyri arvaligar sjúkur*

Etiska ráðið fekk tvær áheitanir um, at taka spurningin upp um almenna screening, tá umræður berarar av teimum álvarsomu serføroysku sjúkunum.

*Rætturin hjá eldri fólkum at liva saman.*
Etiska ráðið fekk eina áheitan um at taka upp spurningin, hvørt tað er etiskt rætt, at eldri pør ikki eru tryggjaði, at tey sleppa at búgva saman, tá tey skulu á ellis-/røktarheim.

*Privat útgreining fyri ADHD*
ADHD Felagið heitti á Etiska ráðið at taka spurningin upp, hvørt tað er etiskt rætt at fólk, sum verða útgreinað privat, ikki sleppa í viðgerð hjá tí almenna, fyrrenn tey eru útgreinað alment.

*Talgild atkoma*
Etiska ráðið fekk í seinnu helvt av desember mánaði eina áheitan um at viðgera, hvørt tað er etiskt rætt, at tað almenna ikki tryggjar øllum talgilda atkomu til heimasíður á almanna- heilsu- og kommunala økinum. Áheitanin snýr seg um fólk, ið hava avbjóðingar við at lesa. Etiska ráðið tekur málið upp á ráðsfundi í januar 2024.

# Virksemi

## Fakligt samstarv og menning

### Ulrike Steuerwald framløga
Mánakvøldið 8. mai kom royndi granskarin Ulrike Steuerwald á gátt at greiða Etiska ráðnum frá teimum serføroysku arvaligu sjúkunum og screening fyri teimum. Ulrike vísti á etiskar fyrimunir við at screena fyri júst hesar sjúkurnar, men legði samstundis dent á, at eitt slíkt tilboð krevur, at fólk verða ordiliga kunnaði, og at ein tekur hædd fyri teimum serumstøðum, sum eru í føroyska samfelagnum.

### Avvarandi framløga
21. apríl bjóðaði Etiska ráðið Karin Laksáfoss og Sámal Rasmussen á fund at greiða ráðnum frá, hví tey meta, at ein eigur at bjóða eitt alment kanningartilboð út, tá um ræður arvaligar sjúkur í Føroyum. Karin og Sámal høvdu eina væl grundaða framløgu fyri ráðnum, ið ráðið brúkar í framhaldandi viðgerðini av evninum.

### Dátueftirlitið
Tað er javnan at Etiska ráðið fær innlit í viðkvom evni, eins og tað meira enn so kemur fyri, at ráðið eisini fær persónsviðkvamt data, tá ráðið fær áheitanir frá fólki. Tískil bjóðaði Etiska ráðið Dátueftirlitinum at greiða ráðnum frá, hvørjum vit eiga at taka atlit til. Tað vóru Súsanna Thomsen og Elin Joensen, ið løgdu fram fyri ráðnum 1. september. Tær vístu á fleiri viðurskifti, ið Etiska ráðið kundi bøta um. Hesi viðurskiftini skulu uppá pláss.

### Granskingaretikkur
14. september var fakligi skrivarin á skeiði um granskingaretikki, ið Fróðskaparsetur Føroya skipaði fyri. Thomas Søbirk Petersen og Jesper Ryberg, sum báðir eru professarar í etikki og knýttir at Roskilde Universiteti, undirvístu.

### Rokningarvergongd og trygdarpakkin
22. september fingu formaðurin og fakligi skrivarin eina introduktión til Trygdarpakkan hjá tí almenna, tá ræður um KT trygd. Avgjørt varð, at Etiska ráðið verður partur av trygdarpakkanum. 28. september

var fakligi skrivarin á skeiði í rokningarverkgongd hjá Gjaldstovuni.

### Fundur við Fólkaheilsustýrið

13. desember hevði Etiska ráðið fund við Fólkaheilsustýrið. Endamálið var at tosa um tey økini, ið bæði Fólkaheilsustýrið og Etiska ráðið hava til uppgávu at lýsa (tó við hvør sínum útgangsstøði), og at upplýsa hvønn annan um okkara arbeiðssetningar.

## Onnur etisk ráð og nevndir

Etiska ráðið skal sambært lógini samstarva við onnur etisk ráð og etiskar nevndir. 20 desember hevði Etiska ráðið við fakliga skrivaranum og formanninum fund við Sjúkrarøktaretiska ráðið og Siðfrøðinevndina hjá føroyskum sálarfrøðingum. Endamálið við fundinum var tvíbýtt. Fyrst greiddi umboðini frá virkseminum, ið tey høvdu havt farna árið, og síðani fluttu fokus seg til samstarv. Semja var um, at tað er upplagt at Sjúkrarøktaretiska ráðið, Siðfrøðinevndin og Etiska ráðið samstarva í framtíðini, og avtalað varð, at vit hava ein fund aftur síðst í mars mánaði (ella fyrst í apríl) at semjast um, hvat evni vit varpa ljós á í felag. Semja var eisini um, at tá vit hava bæði almenn og innanhýsis upplýsandi tiltøk, so senda vit hinum eina innbjóðing at luttaka.

## Útgávur og miðlan

### Ársfrágreiðing 2022

Etiska ráðið gav í apríl 2023 út *Ársfrágreiðing 2022*.

### Heimasíðan

Heimasíðan hevur so hvørt verið dagførd í 2023. Nýtt tilfar, tíðindi, og upptøkur frá tiltaki vóru løgd út á heimasíðuna.

### Facebook

Ráðið hevur í nøkur ár havt sín egna vanga á Facebook, og hevur so hvørt lagt kunnandi tilfar út á síðuna í 2023. Arbeiðsorka er tíverri ikki til nógv virksemi á sosialu miðlunum.

### Etiska ráðið í miðlum

Etiska ráðið hevur á ymsan hátt verið miðlað í miðlunum í 2023 – bæði einstakir ráðslimir, formaðurin og fakligi skrivarin.

#### *Ljóarin*

9. februar var samrøða við nýsetta skrivaran hjá Etiska ráðnum um leiklutin sum fakligur skrivari og etikk.

#### *Ílegukanningar*

20. mars var Noomi Gregersen í Dagur og Viku í sambandi við kjak um ílegukanningar.

#### *Deyðshjálp*

Bergur Debes Joensen, formaður, var í útvarpstíðindunum fyri at skifta orð um deyðshjálp í sambandi við viðgerðina, danska etiska ráðið hevur havt um hetta sama evnið.

#### *Nýggi fakligi skrivarin settur*

Í sambandi við at nýggi fakligi skrivarin varð settur vóru tíðindi um hetta í fleiri miðlum.

#### *Ráðstevnan um fosturtøku*

Umframt at tíðindastubbar vóru um ráðstevnuna um fosturtøku á flestu føroysku tíðindaportalunum, so var formaðurn í Góðan Morgun Føroyum og kunnaði um tað, fakligi skrivarin í útvarpstíðindunum, formaðurin og fakligi skrivarin í Dagur og Viku, fakligi skrivarin var í tíðindunum hjá FM1, og tveir ráðslimir, Jógvan D. Hansen og Katrin Kallsberg, vóru í Breddanum at tosa um evnið. Harumframt viðgjørdi Fríggjadagspanelið 21. apríl ráðstevnuna tó uttan luttøku frá Etiska ráðnum.

## Fundarvirksemi

Etiska ráðið hevði 9 ráðsfundir í 2023, og fleiri fundir vórðu hildnir í arbeiðsbólkum. Á ráðsfundunum luttóku fimm gestir uttaneftir. Harafturat hevði Etiska ráðið havt fleiri fundir í sambandi við ráðstevnuna um fosturtøku, fundir við Heilsumálaráðið (bæði kunnandi og fyri at vísa á ynskið um økta játtan), og áðurnevndu fundirnar í sambandi við hoyringar. Uttanhýsis fundirnir, sum ikki eru nevndir aðrastaðni í ársfrágreiðingini, vóru:

- 22. mars fundur við embætisfólkini í Heilsumálaráðnum, ið vara av Etiska ráðnum.
- 14. apríl heilsaði formaðurin og fakligi skrivarin uppá landsstýriskvinnuna í heilsumálum, aðalstjóran og fulltrúan, sum varðar av Etiska ráðnum.

- 5. oktober var fundur við Heilsumálaráðið, har formaðurin og fakligi skrivarin vístu á, at Etiska ráðið ynskir hægri játtan.
- Umframt fleir i fundir í sambandi við nýggja skrivstovu

## Luttøka uttanhýsis

### *Undirvísing í etiskum atlitum, tá um ræður fosturtøku*

13. apríl var Jógvan D. Hansen umboðandi Etiska ráðið og undirvísti fosturtøkuráðgevingini í etiskum atlitum, tá um ræður fosturtøku.

### *Evnisdagur hjá Javnstøðunevndini*

Noomi Gregersen og Jógvan D. Hansen, ráðslimir, luttóku á evnisdegi hjá Javnstøðunevndini um fosturtøku.

### *Fyrilestur fyri sjúkrarøktaretiskum ráðum*

8. september hevði Bergur Debes Joensen fyrilestur í Skeiva Pakkhúsi fyri sjúkrarøktaretiskum ráðum úr Norra, Svøríki, Danmark, Grønlandi og Føroyum: Evnið var: "Værdibaseret kommunikation mellem magt og kærlighed".

## Fyrisitingin

### Skrivstovuhøli

Øll leigumál í Smæruni vórðu uppsøgd, og tískil var neyðugt hjá Etiska ráðnum at finna nýggj høli. Við hjálp frá Landsverki varð útboð lagt út á Keypsportalin, og tvey boð komu inn. Etiska ráðið valdi í samráði við Landsverk at taka av tilboðnum frá KFUK um høli í Varðagøtu 9. Hølini eru stór, væl útgjørd, liggja væl fyri, hava møguleikan fyri atkomuligum fundarhølum, høli til fyrilestrar og tiltøk eru við í leiguni, og har fara at vera fleiri parkeringspláss, tá útbyggingin á grundstykkinum við síðurnar av er liðug.

### Fíggjarstøða

Í ár hevur Etiska ráðið eitt lítið yvirskot. Hetta er tó vegna tvær ymiskar hendingar, ið gera, at minni er nýtt enn annars. Fyrstu tveir mánaðirnar var eingin fakligur skrivari í starvi, og tískil vóru munandi minni lønarútreiðslur teirri tíðina. Harumframt gjørdi tað, at Etiska ráðið mátti flyta høli, at eingin tíð var til nakað tiltak í seinnu helvt av 2023. Var hetta ikki støðan, so hevði úrslitið sannlíkt sæð øðrvísi út.

Etiska ráðið hevði tó eyka útreiðslur í sambandi við flytingina. Neyðugt var at keypa innbúgv, skipa flutning, keypa skrivstovuútgerð og tílíkt. Alt í alt nýtti Etiska ráðið tískil 672.405 krónur í 2023. Játtanin var 628.000 kr,-. Av tí at yvirskot var aðrastaðni á somu kontu, sum Etiska ráðið er fevnt av, varð tað tó gjørligt at nýta upp til 50.000 kr,- av hesum yvirskotinum til eyka útreiðslurnar, ið stóðust av flytingini.

Við verandi játtan er tað sera trupult hjá Etiska ráðnum at hava nøktandi virksemi. Bara føstu útreiðslurnar komandi ár gera, at Etiska ráðið liggur har um, hvørt tað akkurát verður eitt yvirskot ella akkurát eitt undirskot. Sostatt má annars fast (og neyðugt) virksemi skerjast, fyri at Etiska ráðið kann halda ásetingina um, at tað skal upplýsa almenningin og taka etiskar spurningar til umrøðu í almenninginum, og tiltøkini ráðið kann skipa fyri verða avmarkaði í vavi.

### Arbeiðsorka

Eins og Etiska ráðið hevur víst á fleiri ferðir fyrr, so er arbeiðsorkan í ráðnum ov lág í mun til endamálið við Etiska ráðnum. Lógarkravdar fyrisitingarligar uppgávur fylla nógv og gera, at tíðin hjá fakliga

skrivaranum til kjarnuvirksemið hjá Etiska ráðnum er avmarkað. Samstundis hava vit sæð tað gleðiliga í ár, at munandi fleiri hoyrings- og ummælisskriv eru send til ráðið, og vísir tað bæði, at ráðið uppfyllir ein neyðugan tørv, og krevur sín part av arbeiðsorkuni hjá Etiska ráðnum. Etiska ráðið er varugt við, at tað eru fleiri onnur lógaruppskot og broytingar í kunngerðum, sum eftir røttum áttu at verði send til Etiska ráðið, eins og Etiska ráðið eftir røttum átti at verið til fleiri hoyringar í Løgtinginum. Somuleiðis ger kommunali geirin sær ikki dælt av møguleikanum, at ráðføra seg við Etiska ráðið. Arbeiðsorkan hjá Etiska ráðnum er tó ov lág til, at Etiska ráðið velur at venda sær til stovnar av sínum eintingum.

Tí hevði tað verið ynskiligt, at arbeiðsbrøkurin hjá fakliga skrivaranum verður hækkaður.

## Ætlanir 2023

Etiska ráðið fer at arbeiða við raðfestingum innan heilsuverkið, screening fyri arvaligum sjúkum og vitlíki komandi ár. Arbeiðið innan øll hesi evnini er byrjað, og vónin er, at tað verður gjørligt at skipa fyri tiltøkum í sambandi við øll trý evnini. Harumframt er ætlanin at framleiða undirvísingartilfar um fosturtøku. Undir “Etisk evni” fyrr í hesi frágreiðingini ber tað til at lesa meira ítøkiliga um tað, sum er gjørt og hvørjar ætlanirnar er.

## Samanumtøka

Etiska ráðið hevur verið virkið á ymsan hátt í 2023, í miðlunum, á heimasíðuni, á fundum og tiltøkum, sum hoyringarpartur og annað, og ráðið hevur lagt orku í arbeiðið við evninum fosturtøka, og hevur tað arbeitt við evnunum raðfestingar í heilsuverkinum, screening fyri arvaligar sjúkur og vitlíki.

Árið 2023 hevur verið merkt av, at nýggi fakligi skrivarin skuldi setast inn í uppgávurnar, eins væl og at neyðugt var at flyta skrivstovuhøli. Harumframt er nógv av tíðini – sum ikki er brúkt til fyrisitingarligar uppgávur – brúkt til at fyrireika evnini, sum Etiska ráðið hevur valt at arbeiða við. Úrslitið av hesum verður sannlíkt sjónligt næsta ár, tá Etiska ráðið flytur seg frá eini fyrireikingarfasu til at luttaka meira virkið í almenna kjakinum.

ETISKA RÁÐIÐ

Talið 3 umboðar ávísa rútmu, - lívsins rútmu.
Byrjan – miðja – endi. Skapan – lív – deyði. Fortíð – nútíð – framtíð.

Etiska ráðið viðger evnir, har tað sum oftast ikki eru eintýtt svar og har evnir kunnu síggjast úr ymsum sjónarhornum. Soleiðis ímyndar búmerkið arbeiðið hjá Etiska ráðnum.